# Spennningur í Sørvági

**Mjølnir skal til Sørvágs at møta SÍ sunnudagin. Hetta verður væntandi tættasti dysturin hetta vikuskiftið. Í Havn møtast oddaliðið og botnliðið. ÍF skal til Havnar at verja oddasessin, meðan Fleyr roynir at sleppa av aftasta plássi**

MANSFLOGBÓLTUR
*Kunning frá FBF*



*Um vikuskiftið møtast Fleyr og ÍF í Havn. Fuglfirðingar eru stórfavorittar, og teir hava í hyggju at verja oddasessin. Fleyr roynir hinvegin at vinna sær síni fyrstu stig í hesum kappingarárinum*
*Savnsmynd*

Dysturin millum SÍ og Mjølnir er helst einasti dysturin hetta vikuskifti, har úrslitið ikki er givið frammanundan. Tó er SÍ kanska ikki tað, sum roknað var við, tá kappingin byrjaði.

Gamaní fingu teir eina flúgvandi byrjan uppá kappingarárið, tá teir vunnu Fleyrkappingina, og harvið tryggjaðu sær pláss í steypafinaluni, men síðani hava teir ikki gjørt tær stóru skreytirnar. Afturat sigrunum á Fleyr (tríggir í tali), hevur SÍ bert vunnið ein dyst. Men tað var so harafturímóti júst móti Mjølni, og einki er at ivast í, at SÍ ætlar sær at endurtaka hetta.

Men hesum fer Mjølnir neyvan at lata sær lynda. Teir vístu í Mjølnirkappingini farna vikuskifti, at teir eru væl fyri í løtuni, tá teir góvu ÍF ein skarpan gang í finaluni.

Og hyggja vit at stigatalvuni, so síggja vit, at liðini eru púra jøvn, so tekn eru í sól og mána um, at vit fáa ein spennandi dyst í Sørvági sunnudagin.

### Fleyr - ÍF

Fleyr: spælt 9 dystir, ongan vunnið og null stig. – ÍF: spælt 8 dystir, vunnið allar og 8 stig. Hetta sigur so mikið, at ikki er neyðugt við hvørki vísindamonnum ella spákonum at gita úrslitið av hesum dystinum.

Hjá Fleyr ræður kanska heldur ikki so nógv um at fáa stig burturúr hesum dystinum. Teirra málsetningur er fyrst og fremst at byggja upp eitt nýtt lið, sum einaferð í framtíðini kann liggja í tí endanum, har Fleyr plagdi at liggja og har stuttligast er at vera, og tað er jú í ovara endanum.

Og har liggur ÍF í løtuni og ilt er at síggja, hvussu hetta skal kunna broytast í ár. Vinna teir á Fleyr, so eru teir 3 stig frammanfyri liðið, ið fer at liggja sum nummar tvey sunnukvøldið; SÍ ella Mjølnir. Harafturat hevur ÍF spælt ein dyst minni enn hini liðini.

# Klárir favorittar

**Hetta vikuskiftið í meistaradeildini hjá kvinnum er neyvan eitt av teimum, har fólk fara at sita fjálturstungin av berum spenningi og bíta negl. Til hetta eru liðini ov ójøvn, og í flestu førum er talan helst bert um avgreiðsluspurningar**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Kunning frá FBF*

KÍF spælir sítt fyrsta ár í meistaradeildini, og hóast tær hava ment seg nógv í ár, so er trupult at síggja hvussu tær skulu kunna gera nakað við verandi føroyameistararnar av Tvøroyri. Í Kollafirði rokna tey neyvan við tí heldur, men fara at gera tað so frægt sum gjørligt og fáa sær meira royndir at spæla í bestu deildini, sum tær so kunnu brúka seinri í árinum, tá uppgávurnar verða meira fyrikomandi; serliga móti Fleyr og Drátti.

Hjá TB er umráðandi ikki at missa stig í tílíkum dysti, skulu tær endurvinna meistaraheitið; serliga nú tað tykist sum um at tær hava fingið eitt "ÍF-kompleks". Men alt annað enn ein sigur til TB tykist sera óveruligt

### Fleyr - ÍF

Hóast Fleyr vann eitt sindur óvæntað á Drátti í seinasta umfari av landskappingini og formkurvan tykist ganga uppeftir, so er ÍF ikki hvør sum helst at koma í holt við.

ÍF liggur ovast á stigatalvuni og vann um vikuskiftið Mjølnirkappingina, so eisini her má tað metast sum sera óvæntað, skuldi ÍF ikki vunnið.

### Dráttur - Mjølnir

Hjá Drátti hevur gingið eitt sidur upp og niður í ár, men í seinastuni hevur tað ikki gingið so væl, og tá Dráttur tveir dagar fyri jólaaftan tapti fyri Fleyr, sá út til at vera komið á botn.

Eftir tí at døma, so verður helst sera trupult at fáa nakað burturúr móti Mjølni, sum liggur sum nummar tvey á stigatalvuni, eitt stig eftir oddaliðið ÍF.

Men hinvegin hava tær úr Drátti kortini prógvað meira enn einaferð í ár, at tær gott kunnu bíta frá sær. T.d vunnu tær annan dystin móti ÍF og taptu hin 3-2, so tær hava tenn, men um tær eru nóg sterkar til at gera nakað við Mjølnir, er kortini sera ivasamt.

## Flogbóltsdystir um vikuskiftið

**Meistaradeild kvinnur**

| Staður | Lið | Dagur/dato | kl. |
|---|---|---|---|
| Trongisvágur | TB - KÍF | Leygardagur 11.01.03 | 15.00 |
| Gundadalshøllin | Fleyr - ÍF | Sunnudagur 12.01.03 | 13.00 |
| Giljanes | Dráttur - Mjølnir | Sunnudagur 12.01.03 | 14.00 |

**Meistaradeild menn**

| Staður | Lið | Dagur/dato | kl. |
|---|---|---|---|
| Sørvágur | SÍ - Mjølnir | Sunnudagur 12.01.03 | 14.00 |
| Gundadalshøllin | Fleyr - ÍF | Sunnudagur 12.01.03 | 15.00 |

## Flogbóltsstøður

Meistaradeild, kvinnur

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 11 | 9 | - | 2 | 31 | 14 | 17 | 10 |
| 2 Mjølnir | 11 | 8 | - | 3 | 28 | 12 | 16 | 9 |
| 3 TB | 11 | 8 | - | 3 | 28 | 12 | 16 | 8 |
| 4 Dráttur | 11 | 5 | - | 6 | 19 | 26 | -7 | 5 |
| 5 Fleyr | 11 | 2 | - | 9 | 7 | 30 | -23 | 3 |
| 6 KÍF | 11 | 1 | - | 10 | 7 | 30 | -23 | 1 |

Meistaradeild, menn

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 8 | 8 | - | 0 | 24 | 2 | 22 | 8 |
| 2 Fram | 9 | 5 | - | 4 | 19 | 14 | 5 | 6 |
| 3 Mjølnir | 9 | 5 | - | 4 | 16 | 15 | 1 | 5 |
| 4 SÍ | 9 | 4 | - | 5 | 14 | 15 | -1 | 5 |
| 5 Fleyr | 9 | 0 | - | 9 | 0 | 27 | -27 | 0 |

# FCK leitar ikki eftir nýggjum leikarum

**Leiðslan í FCK hevur gjørt greitt, at hon ongar ætlanir hevur um at skaffa sær nýggjar leikarar. Samstundis roknar málverjin Rune Pedersen við, at nýggjur sáttmáli millum hann og felagið verður undirskrivaður í næsta mánaði**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Hóast nógvar leysasøgur ganga í donsku fjølmiðlunum, um hvørjar nýggjar leikarar FCK skal hava, so avsannar ítróttarstjórin Niels-Christian Holmstrøm, at felagið leitar eftir leikarum.

Hann sigur, at felagið als ongar ætlanir hevur um fáa fleiri leikarar til vega. Hetta stendur at lesa á heimasíðuni byenshold.dk. FCK segði í hósdagin, at áleyparin Marc Nygaard hóast alt ikki var á ynskilistanum hjá felagnum. Nygaard og FCK høvdu annars verið í byrjunarsamráðingum.

– Vit eru væl nøgdir við leikarahópin, sum hann er beint nú. Men um vit fáa møguleikan at gera sáttmála við ein góðan leikara, sum kann styrkja liðið munandi, so er møguleikin tó til staðar, sigur ítróttarstjórin. Hann leggur afturat, at felagið ikki hevur í hyggju at selja nakran leikara beint nú.

### Rune Pedersen er bjartskygdur

Málverjin Rune Pedersen er tann einasti leikarin saman við Toda Jónsson, sum er í sáttmálasamráðingum í løtuni. Sáttmálin hjá málverjanum, sum fyri tað mesta er aftanfyri svian Magnus Kihlstedt, rennur út í summar.

Hann roknar við, at sáttmáli verður undirskrivaður í februar mánað. Hann hevur eins og Todi verið trekur at skriva undir, tí hann ikki hevur verið nøgdur við útspælið frá FCK. Um hann ikki skrivar undir við FCK, so vónar hann at sleppa til okkurt annað land at spæla.

Nú Rune Pedersen hevur boðað frá, at hann helst skrivar undir við FCK, so er tað bara Todi, ið ikki er sáttmálabundin eftir summarfrítíðina. Avgerðin hjá Toda viðvíkjandi nýggjum sáttmála fellur væntandi fyrst í næstu viku.




## Búmerkjakapping

Nevndin í Fráhaldsráð Føroya (FRF) hevur samtykt at skipa fyri kapping um búmerki til felagið.

FRF er samstarvsfelagsskapur fyri skipaðu og sjálvbodnu fráhaldsfeløgini í Føroyum, og hevur til endamáls at virka sum bindilið, at savna og umboða fráhaldsfeløgini í landinum við virðing fyri lógum og viðtøkum hjá hvørjum øðrum. Virka fyri, at skapa almennan áhuga fyri fráhaldsmálum millum børn, ung og vaksin, og soleiðis eggja fólki til at taka lut í tí fráhaldspolitiska arbeiðinum.

Búmerkið skal á einfaldan og beinraknan hátt lýsa virksemi felagsins. Tað kann hava litir, men skal eisini kunna nýtast í svart/hvítum prenti.
Uppskot skulu vísa búmerkið í ymiskum støddum og uppsetingum og við dømum um samanseting av búmerki og navni felagsins. Uppskot skulu harafturat lúka faklig krøv til prenting og myndaframleiðslu.

Nevndin tekur støðu til innkomnu uppskotini.

Ein virðisløn, kr. 10.000 verður latin fyri tað uppskot, ið nevndin metir vera best. Metir nevndin ikki at nakað hóskandi uppskot er komið, skilar hon sær rætt til ikki at lata virðisløn.
Uppskot skulu bera frámerki, sum eisini verður sett á afturlatnan brævbjálva við navni á innsendara.
Uppskot skulu verða felagunum í hendi í seinasta lagi 28. feb 2003.

Uppskot skulu sendast til:

**Fráhaldsráð Føroya**
Box 271
FO-110 Tórshavn



LANDSVERKFRØÐINGURIN

## Fólk til starvsfólkadeildina

Fulltíðarstarv á starvsfólkadeildini er leyst at søkja.

**Arbeiðsuppgávur**
Starvið fevnir í høvuðsheitum um, í samstarvi við deildarleiðaran og onnur skrivstovufólk á deildini, at menna og røkja ymiskar uppgávur, so sum starvsfólkaviðurskifti, samskifti og kunning, nýggja journalskipan, heimasíðuviðlíkahald og aðrar meira vanligar skrivstovuuppgávur. Talan er um eitt starv við spennandi avbjóðingum, og sum gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving og royndir, helst innan omanfyri nevndu øki, og duga væl at málbera seg skrivliga, serliga á føroyskum.
Tað er umráðandi, at tann, ið settur verður, hevur góð samstarvsevni, dugir at arbeiða miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult og er til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar, um tað skal verða. Góður kunnleiki til tær edv-skipanir, ið vanliga verða nýttar á skrivstovum, er ein treyt.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda Landsverkfrøðinginum, Postboks 78, 110 Tórshavn og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 27. januar 2003.

Merkið brævbjálvan »Skrivstovufólk«.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Levi Hentze, starvsfólkaleiðara, á tlf.311333 e-postur: levi@lv.fo



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Stuðlar til stuðulsfólkaskipanina í Tórshavnar kommunu

Stuðulsfólkaskipanin er ein partur av sosialu deild í kommununi, hon hevur egnu umsiting og er skipað í tveimum deildum:
Serdeildin tekur sær av børnum á dagstovni við varandi breki, menningartarni o.l., meðan Familjudeildin tekur sær av børnum, sum hava aðrar trupluleikar.
Søkt verður serliga eftir fólki til Familjudeildina, 20-40 tímar um um vikuna. Størvini verða sett 1. mars 2003, ella skjótast til ber.

**Størvini**

Eitt starv er 20 tímar um vikuna hjá barnagarðsbarni, har m.a. verður arbeitt við tekn-til-talu.

Eitt starv er 20 tímar um vikuna hjá vøggustovubarni, har m.a. verður arbeitt við málsligu menningini.

Eitt starv er 30 tímar um vikuna hjá barnagarðsbarni, har m.a. verður arbeitt við samanspæli og samskifti.

Møguleiki er fyri at seta tvey størv saman til eitt fulltíðarstarv.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er at umsøkjarin hevur námsfrøðiliga ella aðra hóskandi útbúgving, men verður størsti denturin lagdur á:
- at umsøkjarin hevur royndir við børnum og innan tað sosialpedagogiska arbeiðsøkið.
- at viðkomandi hevur hug og evni at arbeiða við børnum og familjum við serligum tørvi.
- at umsøkjarin er búgvin, kann arbeiða sjálvstøðugt og er opin fyri menning í arbeiðinum.

**Starvs- og setunarviðurskifti**
Starvið kann verða full- ella parttíð og verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag ella møguliga annað avvarandi yrkisfelag, Fíggjarmálstýrið og Kommunala Arbeiðsgevararfelagið. Skipað verður fyri ráðgeving, "kollegiala supervisión" og skeiðvirksemi.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Birgit Debess, leiðara av Stuðulsfólkaskipanini ella Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 24. januar 2003. Viðmerk umsóknina " Stuðulsfólkaskipanin"

SNARSKIVAN



REYNI-SERVICE

## Bilur við skaða til sølu!

Fyri P/F Trygd selja vit ein Daihatsu Sirion 1,0, 5 hurðar, árg. 1999, koyrt 39.000 km. Bilurin hevur skaða framman og verður seldur fyri hægsta boð sum hann stendur.

**P/F Reyni Service**
**Bilasølan**
tlf. 353040, lokal 112



## Útsøla

Suðuroyingar – útsølan byrjar mánadagin kl. 13.00.

**Útsøluvøra ÷ 50%.**

**DUET**
Ítróttar- og barnaklæðir í Vági
Tlf. 374221



Rør & Blikk

## RØR & BLIKKSMIÐUR

Søkt verður eftir royndum Rør og Blikksmiði, arbeiðið fevnir mest um nýgerð av miðalstórum bygningum.

Nærri fæst at vita um starvið á:
Tlf. 322 999 far. 225 345

Rør & Blikk fæst umframt alt vanligt rør, blikk og smiðjuarbeiði, eisini við vatnviðgerðaranlegg til svimjihylar

Rør & Blikk, Undir Gráasteini 65, 100 Tórshavn, tlf: 322 999 far 225 345
www.rorblikk.fo



## Skeið til krana D 8-25 tm

byrjar mánadagin 13. januar kl. 19.00.

Tilmelding á tlf. 318821 ella 218777.
Avmarkað luttakaratal.

**Sp/f Koyrikortið**



HERBALIFE

Du bliver hvad du spiser
Vægtkontrolprogram - Kosttilskud
Ring (0045) 7022 2708 eller kig på www.helsetorvet.dk